## Charity Shield á føroyskum

Saman við Lions Club hevur FSF tikið avgerð um, at føroyska kappingarárið nú skal byrja við sonevndum stórdysti millum meistarar og steypavinnarar.

Hetta er ein siður, sum eitt nú í Onglandi hevur sterkar røtur. Har ber dysturin heitið Charity Shield, og sum navnið sipar til, so fer innkomni peningurin til vælgerandi endam´la.

Júst hetta er eisini aðalmálið í føroysku útgávuni av dystinum. Dysturin hesa ferð verður millum føroyameistararnar úr HB og steypavinnararnar úr B36, og verður hesin spældur á ovara vølli í Gundadali mikudagin komandi kokkan 18. Kostnaðurin fyri atgongumerkini er 70 kr.



## Randi setti nýtt met

Randi Kúberg hevur sett nýtt føroyskt met í sleggjuvarpi. Hetta gjørdi hon leygardagin, tá hon í fyrstu kastikappingini á árinum kastaði 35,40 metrar. Randi átti sjálv gamla metið, sum var 35,14. Hjá monnum hevði Heri Ziska eitt kast, sum var longur enn tað, sum vann bronsu á seinastu oyggjaleikkum.

# Landsliðið í 100 ára føðingardag

**Føroyska A-landsliðið í fótbólti vann steyp til ognar, tá eftir brotssparkskapping eydnaðsit at basa Cartagena í triðbestu sponsku deildini**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Saman við Rasmus Nolsøe hevur Fróði Benjaminsen røkt miðverjusessirnar í venjingardystunum, og hetta hevur riggað sera væl, sigur Jógvan Martin Olsen*

Dysturin var partur av 100 ára haldinum hjá felagnum, sum spælir í sponsku segunda División B. Hetat er triðbesta deildin í Spania.

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, sigur, at talan var um ein fínan venjingardyst hjá føroyska liðnum.

– Hetta liðið var munandi sterkari enn finska Turku, sum vit spældu fyrsta venjingardystin ímóti. Fleiri av spælarunum hava áður roynt seg í bestu sponsku deildini, og talan var um eitt lið við góðum tekniskum førleika. Sæð í mun til teir dystir, sum vit skulu spæla í ár, var talan helst um fína mótstøðu, sigur Jógvan Martin.

### Verjan riggaði væl

Sjálvur dysturin endaði við málleysum javnleiki, og tí máttu brotsspørk til, áðrenn steypið kundi handast. Brotsspørkini dugdu okkara menn betri at skjóta, og tí kemur eitt nýtt steyp í ikki alt ov rokaða skápið hjá FSF.

Eftir dystin helt Jógvan Martin Olsen, at hann serliga var væl nøgdur um verjupartin á liðnum.

– Óli Johannesen hevur havt trupulleikar við lærkrikanum, og tað hevur noytt okkum at hyggja at øðrum alternativum. Her hava Fróði Benjaminsen og Rasmus Nolsøe røkt miðverjusessirnar í tveimum dystum, og hetta hevur riggað avbera væl. Og tað er bara at gleðast um hjá okkum.

– Men sum heild, so stóð liðið seg væl í gjár. Fyrstu 30-35 minuttirnar sýndu vit eisini gott fótbóltsspæl, men eftir hetta vórðu vit fyri tað nógva lagdir undir stórt trýst. Eg haldi tó ikki, at hinir eina tí einastu ferð komu til veruligar møguleikar, tí verjuparturin á liðnum sum heild riggaði somikið væl, sigur Jógvan Martin, ið eisini var serstkaliga væl nøgdur við sentrala miðvøllin. Tann partin røktu Mikkjal Thomassen og Sámal Joensen í felag.

Føroyska landsliðið spælir ein venjingardyst afturat á ferðini. Hesin verður spældur leygardagin.

### Føroyska liðið

Jákup Mikkelsen – Atli Danielsen, Fróði Benjaminsen, Rasmus Nolsøe, Marner Djurhuus (Mortan úr Hørg, 45.) – Jákup á Borg (Símin Samuelsen, 70.), Mikkjal Thomassen, Sámal Joensen (Tem Hansen, 45.), Hans Pauli Samuelsen (Jónhard Frederiksberg, 45.) – Christian Høgni Jacobsen (Christian Lamhauge Holst, 45.), Andrew av Fløtum (Rógvi Jacobsen, 45.)

Mjølnir-ÍF 1-3 (13-25, 23-25, 25-18, 20-25):

# ÍF heldur fast um oddasessin

**ÍF vann ein týdningarmiklan sigur í meistaradeildini hjá kvinnum, tá tær vitjaðu hjá Mjølni í gjárkvøldið**

FLOGBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppur og botnur møttust í KÍ-høllini í gjárkvøldið, tá Mjølnir tók ímóti ÍF í meistaradeildini hjá kvinnum. Undan dystinum lá ÍF á odda í bestu kvinnudeildini, og tað vóru eisini tær, sum byrjaðu dystin betri. Tær løgdu hart út í fyrsta setti, og ikki gekk long tíð, fyrrenn tær høvdu lagt seg trygt á odda í einum setti, sum tær vunnu trygt.

ÍF tóktist vera væl sterkari í bæði álopinum og í blokkinum í hesum settinum, meðan kvinnurnar hjá Mjølni slett ikki tóktust klárar til dystin.

Í øðrum setti var tó heilt øðrvísi hjá Mjølni. Nú vóru tær nógv betri við, og munurin á liðunum var at kalla eingin. Liðini fylgdust so at siga allan vegin, men í avgerandi bóltunum hildu kvinnurnar hjá ÍF høvdið kalt.

### Spenningur kom í

Kvinnurnar hjá Mjølni vóru blivnar betri og betri, sum dysturin leið, og í triðja setti gekk enn betri enn í teimum undanfarnu. Nú legði Mjølnir betri fyri, og so við og við vunnu tær sær eina lítla leiðslu. Munurin var ikki tann heilt stóri á liðunum, men ímóti endanum var tó eingin ivi um, at Mjølnir fór at vinna hetta settið.

Spenningurin vardi tó ikki so leingi. Í fjórða setti legði ÍF betri fyri, men Mjølnir royndi tó alla tíðina at hanga í oddaliðnum. So við og við megnaði ÍF tó at fara nøkur stig fram um Mjølnir, og at enda vann ÍF eisini settið og dystin.

Við sigrinum hava kvinnurnar hjá ÍF nú lagt seg trý stig fram um SÍ á øðrum plássi. ÍF hevur tó leikt ein dyst fleiri. Annars er at siga um dystin, at hann var ikki serliga væl leiktur. Leikferðin var ikki seliga høg, og munurin á liðunum var ikki tann heilt stóri. ÍF var tó sterkari í bæði álopinum og í blokkinum, og serliga hesi bæði tingini vunnu dystin fyri oddaliðið.

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 18 | 13 | - | 5 | 45 | 31 | 14 | 19 |
| 2 SÍ | 17 | 11 | - | 6 | 39 | 28 | 11 | 16 |
| 3 Dráttur | 18 | 11 | - | 7 | 42 | 34 | 8 | 15 |
| 4 KÍF | 18 | 7 | - | 11 | 35 | 38 | -3 | 12 |
| 5 TB | 17 | 8 | - | 9 | 32 | 29 | 3 | 10 |
| 6 Mjølnir | 18 | 3 | - | 15 | 16 | 49 | -33 | 2 |